SOSIALURIN

Útgevari:
FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR

Blaðstj.:
Villi Sørensen.

Box 76.

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
TELF 1890

Fiskasølan og landsstýrið

Havi frætt, at teir báðir fólkatings- og løgtingsmenninir Hákun Djurhuus og Jóhann Poulsen hava sagt, at løgmaður hevur rætt at vera á fundum í fiskasøluni og taka lut í viðgerð og avgerð felagsins, og at løgmaður so statt hevur ábyrgd fyri tí, ið fiskasølan ger.

Tað er hugstoytt, at tveir av okkara so høgt standandi politisku álitismonnum skulu annaðhvørt vera so óvitandi ella vera av lyndi so vorðnir, at teir ikki kveppa seg við at tveita ósannindi um seg í ti treysti, at tað fer at bera til at gera tað uttan at verða nelgdir upp sum ósannindismenn ella óvitingar.

Tað er ikki ferilin av sonnum í frásøgn teirra fólkatingsmanna.

Føroya Fiskasøla er eitt privat andeilsfelag sum onnur privat feløg.

Á tess fundir hevur eingin landsstýrismaður, heldur ikki løgmaðurin, rætt at koma óboðin. Hvørki á stjórnarfund ella á starvsnevndarfund.

Núverandi løgmaður er enn ongatíð boðin á nakran fund í Føroya Fiskasølu, og hevur hann so statt ikki haft høvi at hava nakran ávirkan á arbeiðshátt og sølupolitikk Fiskasølunnarhandilsskapin.

Hvar og hvussu Fiskasølan hevur selt, hevur verið avgjørt av felaginum sjálvum á fundum, har ið eingin landsstýrismaður hevur haft lógfestan rætt at verið á.

Hvussu úrslitið av fiskasølum felagsins hevur verið býtt millum fiskimenn og útgerðarmenn, hvussu nógv ið felagið hevur hildið afturi at leggja í tiltaksgrunn og felagspuljuna hevur landsstýrið yvirhøvur einki haft at siga í.

Einasta skylda Føroya Fiskasøla hevur haft og hevur yvir fyri landsstýrinum er at geva upp sølunøgd og sølurúrslit fyri at hava hagskirslutalið í lagi.

Tað, ið landsstýrið hevur kunnað gjørt yvir fyri Føroya Fiskasølu, er tað sama, sum tað kann gera viðvíkjandi all ari sølu av vørum úr Føroyum til fremmandan marknað, nevniliga at forða fyri ella banna sølu, um talan er um dumpingprísir ella ov stóran vanda fyri ikki at fáa sølupeningin heim, ella tá ið hóttar við kriggj ella øðrum liknandi ólukkum.

— — —

Føroyska landsstýri hevur einki at gera við ásetan av landingarprísum, ið verða eftir uppskoti frá Hákuni Djurhuusi og felagsmonnum hansara settir av eini serligari prísnevnd.

Hvussu ómetiliga »ópopulera« henda fólkaflokkska prísnevnd er millum fiskimenn og Føroya fólk er almanna kunnugt.

At Hákun Djurhuus roynir at fjala syndir sínar við at geva ranga frásøgn á politiskum fundi er ringt og mannaminkandi fyri mann, ið gevur seg til at vera kandidát til so týdningarmiklan sess sum fólkatingssessin, men tað er sanniliga ikki betri, at maður sum Jóhann Poulsen ropar í kór við H. D. í hesi villandi og ósonnu framstilling.

— — —

Tessverri hevur landsstýrið ikki hond í Føroya Fiskasølu.

Tað hevði verið betri, um føroyingar høvdu haft givið javnaðarmonnum og Louisa-monnum meirluta at skipa Føroya Fiskasølu soleiðis, sum teir ferð eft ir ferð hava haft uppskot um.

P. M. Dam.

TJÓÐVELDSKAR OG FÓLKAFLOKKSKAR SKRØNUR

Ein partur skuldi steingja Oyggjarveg in — eingin steinging varð.

Alstórur geislavandi skuldi standast av radarstrálunum — nú váttað á hægsta staði, at tað als ongar slíkar stráli vóru.

Radarstøðin skuldi verða burtur

Fólkaflokkurin — reiðaraflokkurin

»Richard kom yvir til okkara (fólkaflokkin), tí tað er her, tú hoyrir heima.«

Tað er óivað mangur, ið kennist við hesi orðini, sjálvt um meira enn 2 ár eru farin, síðan fólkaflokkstingmaðurin **Frederik Bláhamar,** segði hetta á tingfundi — fundi, ið varð útvarpaður.

Orðini vóru søgd til táverandi javnaðartingmann Richard Jacobsen.

Richard Jacobsen hevur verið partaeigari í reiðaravirki í Klakksvík, men Richard er javnaðarmaður við lív og sál.

Tað duga fólkaflokksmenn ikki at skilja. Teirra flokkur er ein reiðaraflokkur, og tað dugdi Bláhamar ikki at dylja yvir, tí heitti hann so bønliga á Richard um at koma yvir í fólkaflokkin

»... **tí tað er her, tú hoyrir heima.«**

Tað er ikki lukkuligt í fólkaflokkseygum, at ein reiðari er javnaðarmaður — í parti og flokki við fiskimonnum og arbeiðarum.

Tað fekk hann, ið hesar reglur skrivar at ásannað — eisini inni á Føroya løgtingið, har Hákun Djurhuus las slíkan lestur av hevndar- og ókvæmisorðum niður yvir Richard Jacobsen, at sambandsmaðurin Hans Iversen mátti tala at.

Fiskimenn og arbeiðarar!
Hvat hava tit at vænta haðani?
Kunnu tit velja ein slíkan flokk?

Hin besta upp sparingin

Eins og annar skattur var fólkapensjónsgjaldið ikki so væl umtókt av øllum; men nú eru tað kortini tey flestu ið hava skilt, hvønn stóra týdning hetta gjald frá hondini.

Taka vit t. d. mann, ið hevur 10.000 kr í inntøku um árið, verður árliga fólkapensjónsgjald hansara 100 kr.

Í 48 ár — í flestu førum bestu arbeiðsár mannsins — hevur hann samanlagt goldið 4800 kr. ella tað sama, sum hann fær útgoldið fyrsta árið.

Betri uppsparing kann ikki hugsast!

Stuðul til lesandi ungfólk

Tann stuðul, ið latin var til lesandi ungfólk, og tá serstakliga til avbyggdanæmingar, ið leitaðu sær heimanifrá at søkja sær lærdóm í stórbygdini ella býn um, munaði lítið og einki, tí dýrt var alt: búðstað, kostur, bøkur o.s.fr.

Undir sítandi landsstýri er hesin stuðul stórliga oktur, so avbygdanæmingar ella teir, ið ringast eru stillaðir figgjarliga, nú fáa bæði tvær og fleiri ferðir tað, ið teir fingu frammanundan.

Við at tryggja ein javnaðarsigur við valið, seta vit nýggjar stuðular undir JAVNAÐARLANDSSTÝRIÐ og skapa likindi fyri framhaldi av at bøta um korini hjá okkara lesandi ungdómi.

Tað er ósatt

Ikki ein einasti føroyingur er ætlanin at nýta í hertænastu við NATO-støðina.

Annað er, um onkur føroyingur av egnum frium vilja ynskir at verða lærdur til hertænastu.

Eitt tílíkt ynski sigur verjumálaráðharrin verður tikið vælviljandi til umhugsingar, men latum okkum taka uppafturi:

14. September sigur ósatt, táið hann skrivar, at ætlanin er at gera føroyingar skyldugar at gera hertænastu uppi í Mjørkadali.

Tað er ikki ætlanin at leggja herskyldu á nakran føroying í Føroyum.

Men møguleiki er hjá føroyingi at koma, um hann friviliga meldar seg.

stongd — váttað at gyrðingin var hægst 200 m. og at tílíkar radarstøðir vóru í Danmark 50 m frá húsum.

At talan skuldi verða um fleiri túsund hermenn — váttað av hægsta ráðharra í herveldi, at tað fyri bæði Eiði og Sodnafelli 140—150, flestir teknikarar.

Kunngerð

Tað verður her gjørt kunnugt, at fólkatingsval fer fram týsdagin 15. november 1960 *í løgtingshúsinum í Tórshavn.* Umframt veljarar í Tórshavnar kommunu hava veljarar í Tórshavnar uttanbíggja kommunu (tó ikki Syðradalur og Norðadalur) valstað í Tórshavn.

Atkvøðutíðin verður frá kl. 10—13 og frá kl. 15—20, og verður tá givið uppat so skjótt sum støðgur kemur í.

VALSTÝRIÐ Í TÓRSHAVN
Carter Niclasen.
fm.

Víðari vinnuræsur — fleiri havnir

JAVNAÐARMENN settu skøtil á og undir leiðslu P. M. Dams, løgmann, var lagt til brots fyri at viinna Føroyingum víðari vinnuræsir, har undir fleiri havnir, í Grønlandi. — Undir ringum og torførum umstøðum vórðu 5 nýggjar havnir vunnar føroyskum fiskimonnum.

Hetta kom mongum óvæntað, tí í 8 ár — og hartil allra bestu vinnulikindum — høvdu sambands- og fólkaflokksmenn stýrt landinum uttan at nakað var hent ella gjørt fyri at bøta um korini hjá túsindtals arbeiðsleysum fiskimonnum.

Tað skuldi bara ganga stutt tíðarskeið, frá tí javnaðarlandsstýrið hevði tikið við, og hagar 5 nýggjar havnir vóru vunnar føroyskum fiskimonnum í Grønlandi.

Við tí ovurstóra skipatroti og ræðuliga arbeiðsloysi var hetta bráðneyðugt.

Tær 5 nýggju havnirnar vórðu vunnar, og vinnuræsurnar munandi víðkaðar.

— — —

FYLKIST UM JAVNAÐARFLOKKIN, tað er leiðin og trygdin fyri, at striið móti virkisloysi eins og striðið fyri betri vinnulikindum og harvið bottum livilikindum uttan støðg verður hildin áfram.

Eingin so ring gerð hevur verið gjørd

Allir fiskimenn, sum nú hava fingið sær skip, ella sum eru við at fáa sær skip, eru samdir um, at eingin so ring gerð er gjørd sum tann ið fólkaflokksmenn, sambandsmenn og tjóðveldismenn gjørdu, tá ið teir tóku landshandilin av.

Hesin stovnur var farin undir at keypa útgerð í stóum til fiskiflotan, og við hjálp av honum kundu einstakir fiskimenn, fiskimannasamtøkur fáa útgerðarvørurnar biligari enn heilsølumenninir kundu selja tær. Haraftrat var møguleiki fyri lagaligum kreditti, ið okkara vinnumonnum so harðliga tørva, kreditt, sum ger, at skipaeigarin kann hand la friur har, sum biligastu og bestu vørurnar kundu fáast, og selja har, mest kundu fáast fyri veiðuna.

Nú rópa allir fiskimenn eftir einum tílíkum innkeypsmiðstovni fyri allan fiskiskapin í Føroyum, so teir, ið veiða, eins og teir, serliga teir smáu, sum skipini eiga, kunnu fáa útgerðina lagaligast og biligast og mesta prísin fyri fiskin, tann veruliga prísin ið mark anaðurin kann geva.

Men fiskimenn, skipaeigarar, hetta krav kunnu tit einans vinna uppfylt við at velja javnaðarmenn, tann flokk, sum troðkaði landshandilin ígjøgnum, tá ið kriggið brast á, og sum framvegis hevur á stevnuskrá síni at fáa alla innflytjan av útgerðarvørum keypta undir einum, harvið hon kann fáast biligast, og fáa tað skipað soleiðis, at allir, ikki bara nakrir fáir stórir, kunnu fáa útgerðina til biligasta prís uttan óneyðugan millummannavinning.

Allir fiskimenn, allir arbeiðarar, alir frælslyntir og sosialt interesseraðir veljarar eiga tí til hetta fólkatingsvalið eins og til øll politisk og stjórnarlig val velja javnaðarmenn at taka sær av teirra áhugamálum.

Tann 15. í hesum fara vit at velja javnaðarmenn á danating !

Eingin má sita heima!
Hann, ið situr heima svíkjur.

Miðvíst hevur hetta landsstýri sett kós og longu vunnið væl

2 ár eru farin av tíðini av hesum landsstýrisskeiðinum.

Vit hava vunnið:

Stórar sosialar ábøtur.

Skip bygd í hópatali. Tá ið hetta árið er farið, eru yvir 30 linubátar komnir til landið, og klárt er til byggja annaðslíkt komandi árini.

Lániskipanir til ileggingar til húsabyggingar, byggingar av iðnaðarvirkjum, so vit kunnu koma at basa arbeiðsloysinum.

Greitt at fara undir bygging av sinnis sjúkrahúsi, landssjúkrahúsi.

Farið er undir at byggja studentaskúlan,

Greitt er til byggingar av einum stórum laboratorium fyri tekniska skúlan, navigationsskúlan, maskinmeistaraskúlan, havrannsóknarstovuni, fiskaribiologiskar kanningar.

Viðkaðar eru ræsurnar í Grønlandi.

Fólkaflokkska meirlutastýrisins ógerð við 3 mila sjómarkinum bøtt við nýggjum 6 og 12 mila sjómarki,

Ravmagnanin av Føroyum finnansierað.

Vit megu halda fram við hesum positiva politikkinum.

Allir góðir føroyingar megu tí á val

SVIKU OYGGJARVEGIN

Fólkaflokkska landsstýri við Hákuni Djurhuusi sum høvuðsmanni váttaði yvir fyri Nato og ríkisstýrinum, at oyggjarvegurin hevði ongan trafikalan týdning, altso ongan týdning sum samferðsluvegur.

Halda Havnarmenn hetta? Halda Vestmenningar, Kvívíkingar og Kollfirðingar hetta! ! !

Hvat siga teir til slíkar mean! !